Marran hjá bussførarum:

Svartakálk og vegurin sperraður

— Tvey óhapp hjá Bygdaleiðum síðani vanlukkuna. Ongin fólkaskaði.

Tvey óhapp hava rakt Bygdaleiðir síðani vanlukkuna undir Vaðlaknúki.

Annan jóladag um hálvgumeitt tíðina kom Bent Jákup Hansen, bussførari, í ta støðu, bussførarar stúra eina mest fyri. Í nógvari hálku, svartakálki, stendur ein bilur tvørur á vegnum. Ongin møguleiki er at sleppa fram við honum. Bent Jákup greiðir frá, at hann hevði einar 80 — 100 metrar at steðga bussinum. Tað eydnaðist eisini, men í tí bussurin steðgaði bar hann við bilin, sum so fór í ein annan bil.

Hetta hendi á Oyggjarvegnum, oman fyri grøvini, sum bilvrak fyrr blivu koyrd í. Bussurin kom úr Vestmanna. Bara trý fólk vóru í honum.

Bilurin, sum stóð tvørtur á vegnum, var ikki nóg væl skøddur til ta nógvu hálkuna og slapp ongan veg. Í báðum vegjaðarum stóðu bilar, tí fólk vóru farin at skumpa hin út av koyribreytini.

Hetta gjørdi, at bussurin ikki slapp í millum og tí noyddist at steðga. Bent Jákup Hansen sigur, at hann bæði við floytuni og ljósunum ávaraði fólkini á vegnum og tey fóru eisini av vegnum.

Hann boðsendi eisini løgregluni, sum m.a. kannaði ferðskivuna hjá bussinum. Hon visti, at bussurin koyrdi 40-50 km/t. áðrenn óhappið hendi.

Tey trý ferðafólkini noyddust ikki at bíða, meðan løgreglan avhoyrdi partarnar í óhappinum. Bussførarin fekk teimum fart við einum persónbili oman til Havnar.

Tordu ikki við bussinum

Mánakvøldið fór ein hýruvognur, sum koyrdi fyri Bygdaleiðir, út av í Kaldbak. Trý fólk vóru farin úr bilinum, sum skuldi venda, áðrenn hann fór aftur til Havnar. Bilførarin var einsamallur og fekk ongan skaða.

Tá hált er og ikki nógv ferðafólk, plaga Bygdaleiðir at senda hýruvognar í staðin fyri bussar til Kaldbaks og Kirkjubøar.

Jón Rasmussen, leiðari á Samferðsluskrivstovuni, sigur, at eftir vanlukkuna 21. desember vóru munandi færri ferðafólk við leið 400, Tórshavn-Leirvík. Hann hevur tó onki tal, sum kann lýsa, hvussu nógv vanlukkan ávirkaði.

Enn er ikki avgjørt, um bussurin, sum fór oman í fjøruna, skal gerast aftur. Hann er ikki kolldømdur enn, sigur Jón Rasmussen.

hd

Ongi ferðafólk vóru í hýruvogninum, sum mánakvøldið fór út av í Kaldbak. Hann koyrdi fyri Bygdaleiðir

Kanningarnar ikki lidnar

Ikki fyrr enn eina ferð í næsta mánað fær fútin endaliga frágreiðing um bussvanlukkuna í Eysturoynni 21. desember í fjør.

Sýslumaðurin í Eysturoynni, Frimodt Poulsen, skal skriva hesa frágreiðing, tá hann hevur fingið øll kanningarúrslit og allar avhoyringar eru lidnar. Tá fútin hevur fingið frágreiðingina, skulu løgfrøðingar hansara lesa hana og síðani verður avgjørt, um annar ella báðir bussførararnir skulu ákærast fyri brot á ferðslulógina og/ella revsilógina. Hetta er tann vanliga mannagongdin aftaná ferðsluvanlukkur.

Frimodt Poulsen segði í gjár, at enn hevur hann ikki fingið alt tilfarið. Frágreiðingin hjá Bileftirlitinum er ikki komin og heldur ikki er frætt úr Danmark, hvat blóðroyndirnar sýna.

Sýslumaðurin sigur, at báðir bussførararnir skulu avhoyrast aftur, áðrenn frágreiðingin verður skrivað.

Meðan vanlukkan verður kannað, eru bussførararnir loystir úr starvi.

hd

Gummibátarnir skornir upp

Beint fyri nýggjár hevur onkur gjørt seg inn á gummibátarnar hjá línuskipinum Strandingi, sum lá í Runavík. Tveir gummibátar eru skornir upp og ivasamt er, um teir kunnu gerast aftur, upplýsir løgreglan í Eysturoynni.

Neyðrakettir og -bluss eru tikin úr gummibátunum. Eisini hevur onkur verið umborð á útróðrarbátunum Kúrbergi og Sjóløvuni í Runavíkar havn og ognað sær tilfar til nýggjársaftan. Somuleiðis eru medisinkisturnar brotnar upp og okkurt tikið haðani.

Annars verður morfin ikki longur goymt í medisinkistunum hjá fiskiførum, júst tí, so ofta var stolið úr teimum.

hd

Fingu 72.000 tons aftur

— Kvoturnar gerast størri meðan fiskiskapurin minkar.

72.000 tons lupu av. Útlendingar brúktu bara 70% av kvotum sínum í 1986.

Hetta er niðurstøðan, nú tølini fyri veiðuna hjá útlendskum fiskiførum undir Føroyum í 1986 eru komin.

Útlendingar, tað vil siga Sovjett, Eysturtýskland,

Framhald a síðu 19

	Danmark	Bretland	V.Týskl.	Frakland	EEC	Noreg	Ruskland	Ø.Týskl.	Samanlagt
Toskur		13	2		15	28			43
Hýsa		3			3	5	30		38
Upsi	21	910	11	36	978	18	2		998
Longa			6		6	2.526			2.532
Blálonga	4		171	2.783	2.958	102			3.060
Brosma						1.821			1.821
Kongafiskur	59		5.026	599	5.684	24	320		6.028
Kalvi			16	11	27	62			89
Svartkalvi			60	24	84				84
Svartkjaftur				108	108	27.100	109.655	5.069	141.932
Makrelur	620			41	661	4.270	4.565		9.496
Gulllakkur							434		434
Brugdulívur						44			44
Hestamakrelur						20			20
Onnur Fiskasleg	6	2	31	33	72	56	209		337
	710	928	5.323	3.635	10.596	36.076	115.215	5.069	166.956
Kvota					45.500	61.150	122.200	10.000	328.850